# 135 brekað í hopla á Zarepta

**Um vikuskiftið vórðu 310 fólk á familjulegu fyri brekað á Zarepta á Vatnsoyrum. Njótið myndirnar…**

LEGA
*Orð og Myndir:*
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*




*Øssur er ikki í iva, tá hann verður spurdur, hvør besti fótbóltsleikarin í heiminum er: Michael Owen úr Liverpool! Vinstrumegin síggja vit Herfinn, sum ikki tykist vera eins áhugaður í Owen*

24. árið á rað varð familjulega fyri brekað hildin í frálíka náttúruumhvørvin-um á Zarepta á Vatnsoyrum, og sum vanligt var uppmøtingin sera góð. 135 brekað luttóku á leguni, og við avvarðandi, starvs- og hjálparfólki vóru tilsamans 310 fólk savnað frá hósdegnum til sunnudag.

**Nógvir aktivitetir**

Tey brekaðu høvdu hesar dagarnar møguleikar fyri eini øðrvísi uppliving samanborið við gerandisdagin, sum samstundis er ein umlætting fyri starvsfólkið á stovnum kring landið, og skráin var fylt við alskyns aktivitetum. Leguluttakarar kundu svimja, gera fimleik, spæla fótbólt, rógva, klippa, tekna, syngja, spæla tónleik, ríða á hestbaki o.s.fr.

Meðan leguluttakararnir á henda hátt eru upptiknir, eru eisini møguleikar fyri innihaldsligari gósðsku hjá starvsfólkið og avvarðandi. Skipað varð fyri fyrilestrum, sum faklærd fólk hildu, har viðkomandi mál vórðu greidd frá. Ymsu fyrilestrarnir vóru m.a. annað um tunglyndi (depressión), royndir hjá foreldrum við sálarsjúkum børnum, brekað í skaldskapi og um at liva við sklerosu.

Leygardagin varð skipað fyri Grand Prixi og framsýningum uttanfyri í sólini, har brekaðu luttakararnir høvdu høvi at sýna fram tað, tey síðani Dýra Biðidag (hósdagin) høvdu arbeitt við.

Í kjalarvørrinum av kjakinum um nakkafoldskanningar og tilboðini um at avmarkað t.d. mongolar rennur einum í hug ígjøgnum eitt vikuskiftið saman við hesum veika samfelagsbólki, hvussu fátækari okkara samfelag hevði verið uttan hesi øðrvísi, men litríku og stuttligu menniskju. Vit »normalu« hava nógv at læra frá hesum fólkum, sum ikki gera eini flugu mein og livandi í nú´inum njóta ein dag í senn. Gævi vit øll høvdu ein lítlan mongol í okkum.

Eitt frálíkt vikuskiftið, og vit lata myndirnar tala fyri seg…



*Jimmy situr á rossi, sum Holgar Jacobsen eigur og hevur fingið vestur á Zarepta. Ríðing er ein fastur táttur hvørt árið, sum er vorðið eitt hæddarpunkt á leguni*



*Súkklubátarnir er eftirhondini vorðnir eitt vørumerki fyri legurnar á Zarepta, og er hørð kapping millum leguluttakararnar at royna súkklubátarnar, har henda myndin er tikin, ella á Leitisvatni*



*Maðurin við teimum góðu hálvthundrað landsdystunum, Allan Mørkøre, var hetjan av øllum hetjum. Her er Eyðstein sloppin framat stjørnuni eina løtu*



*Tað var sera forvitnisligt fyri fleiri leguluttakarar, at ein ikki sá út sum øll hini. David Lukama í miðjuni er úr Zambia og giftur til Klaksvíkar, og Eyðstein er farin undir at kanna, hvør myrki fremmandamaðurin er. Høgrumegin sæst Sunneva Østerø, og høgrumegin í bakgrundini síggja vit Jón Gregersen*



*Leygardagin var klovnavitjan í góðveðrinum, og setti hetta veruliga gongd á stemningin. Ikki verður í hesi syftu avdúkað, hvør goymir seg handan málingina og klovnaklæðini*



*Øssur, hesaferð í Chelsea outfit, við liðini á Esther Mariu niðri við tjørnina frammanfyri fótbóltsvøllin*



*Júst í Túni »in action« á fótbólsvøllinum, meðan Øssur eygleiðir í bakgrundini. Ikki sama støði, Øssur er vanur við sunnudagar kl 15 í Gundadali, men lad gå…*